## USA og Kina ikki fíggindar

Amerikanski forsetin, sum er á vitjan í Kina, sigur, at tað stendur ikki skrivað nakrastaðnmi, at USA og Kina eiga at vera fíggindar. Tað segði Barack Obama í einari røðu fyri studentum á lærda háskúlanum í Shanghai. Hann segði, at góð viðurskifti millum Beijing og Washington kunnu gera menna friðin og vælferðina í heiminum. Hann segði, at kinesarar skulu hava lut í tí, sum hann kallaði heimsrættindi. -Hetta er galdandi fyri øll fólk, eisini átrúnaðarligar og etniskar minnilutar, sama um teir búga í USA, Kina ella onkrum øðrum landi, segði Obama í røðuni fyri studentunum í Shanghai.



## Skulu úr Afghanistan

Ein stórur meiriluti av bretska fólkinum vilja hava stjórnina at taka teir bretsku hermenninar úr Afghanistan. Í einari meiningakanning, sum blaðið The Independent kunngjørdi í gjár, svaraðu 71 prosent av teimum spurdu, at hermenninir skulu takast heim eftir einum ári ella so. Bara 22 prosent halda, at Bretland skal framhaldandi hava hermenn í Afghanistan. Í løtuni eru 9.000 bretskir hermenn í Afghanistan, og Gordon Brown, forsætisráðharri, hevur sagt, at stjórnin ætlar at senda 500 hermenn hagar afturat.

# Føroyska fiskavirkisvinnan gev

**Átta feløg, sum reka fiskavirki og partvís hava skiparakstur, høvdu samanlagt eitt hall í fjør upp á 58,7 miljónir krónur. Árið fyri var hallið heilar 103,7 miljónir krónur. Ein stórur partur av hallinum í fjør og fyrraári stavar frá skiparakstri. Av átta feløgum, hekk raksturin saman hjá teimum fýra. Hetta vísir ein roknskapargreining, sum grannskoðaravirkið NOTA hevur gjørt. Virkini, sum eru við í greiningini, hava umleið ¾ av fiskaframleiðsluni í Føroyum**

FISKAVIRKIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

NOTA, sum er fyrrverandi Rasmussen & Weihe, hava síðan 2004 greinað gongdina hjá føroyska fiskiskipaflotanum og fiskavirkisvinnuni.

Flestu fiskiskip yvir 110 tons (línuskip/ garnaskip) og trolarar, sum hava yvir 400 hk, eru við í greiningini. Útróðrarflotin og eitt nú trolbátarnir, sum um sumrarnar hava loyvi at fiska á landleiðini, eru ikki við.

Í blaðnum fríggjadagin høvdu vit nakað um greiningina, sum viðvíkur fiskiskipaflotanum, og í dag fara vit at hyggja at gongdini hjá føroysku fiskavirkjunum, sum eru við í roknskapargreiningini hjá NOTA.

Luttakandi feløgini, sum eru við í hesi greining, eru P/F Føroya Fiskavirking við 54,7 % av rávøruni í 2008, P/F Kósin (14,6%) P/F Fiskavirkið í Gøtu (8,2%), P/F Delta Seafood (8,2%), P/F Sandoy Seafood (5,6%), P/F Vaðhorn (5,1%), P/F Norðís Seafood (2,5%) og Sp/f Eystís Seafood (1,1%).

Um hesi prosenttøl yvir keypta rávøru verða løgd saman, geva tey 100%. Tað merkir tó ikki, at hesi átta feløgini vóru einastu keyparar av rávøru í hesum ári. Nøkur virki eru ikki við í greiningini hjá NOTA. Tó umboða hesi feløg umleið ¾ av samlaðu fiskaframleiðsluni í Føroyum.

Í síni frágreiðing til greiningina, sigur grannskoðaravirkið, at hendan byggir á almennar roknskapir umframt á eykaupplýsingar frá ymisku feløgunum, sum í sínum ársroknskapi annars ikki upplýsa ráfiskanøgd, nettosølu og ráfiskakostnað.

- Roknskapirnir hjá luttakandi feløgunum eru uppsettir ymiskt, eins og kontur eru bólkaðar ymiskt. Hetta kann viðføra, at feilir kunnu vera í samanlagda roknskapinum fyri øll feløgini, men hetta hevur helst bert lítlan týdning, sigur felagið.

### Hall øll árini

Í stuttum gevur ársúrslitið hjá hesum átta feløgunum í 2008 eitt samalað hall upp á 58,7 miljónir. Hetta er tó eitt frægari úrslit enn í 2007, tá samlaða hallið var heilar 103,7 miljónir krónur.

Í síni frágreiðing, sum vit venda aftur til seinni í hesi grein, vísir NOTA á, at tað serliga er skiparaksturin, sum tvey av hesum feløgum høvdu í 2008, ið stóð fyri meginpartinum av stóra hallinum hesi bæði árini.

Hetta sæst eisini í samanløgdu ársúrslitunum hesi bæði árini, har dóttirfeløg/ atknýtt feløg góvu heilar 91,9 miljónir krónur (2007) og 43,6 miljónir krónur (2008) í halli.

Sjálvur virkisraksturin er so munurin á samlaða hallinum og úrslitinum hjá dóttirfeløgum/ atknýttum feløgum.

- Vit hava ikki eina eintýdda niðurstøðu um gongdina hjá hesum feløgum. Tó kunnu vit staðfesta, at raksturin hjá virkjunum samanlagt hevur givið hall øll árini, sum greiningin fevnir um (2004-2008).

NOTA vísir á, at úrslitini hava verið svingandi øll árini, men árini 2006-2007 var talan um eina stóra afturgongd.

- Skiparakstur hevur aftur tyngt um raksturin hjá fiskavirkisvinnuni í 2008, men ikki í sama mun sum í 2007. Hetta er einamest orsøkin til, at ársúrslitið í 2008 var betri enn ársúrslitið í 2007. Tó gjørdist 2008 aftur eitt vánaligt ár hjá virkjunum, sum eru fevnd av okkara kanning.

Greiningin vísir eisini, at eginognin hjá feløgunum, sum reka fiskavirkir, samanlagt minkar, samstundis sum skuldin veksur.

- Nøkur feløg hava rímiligan rakstur, kanska serliga tey, sum virka saltfisk, men hjá fleiri virkjum er gjaldførið hart spent í 2008, og neyðugt hevur verið við hjálp frá fíggingarstovnum at halda virkseminum í gongd.

Á fundi í hølunum hjá Norðoya Sparikassa í Miðlon seinasta hósdag, helt Bjarni Arnason, sum saman við Jacobinu í Lambanum stóð fyri framløguni, tað vera áhugavert, at fólk yvirhøvur hætta sær undir fiskaframleiðslu, soleiðis sum gongdin hevur verið seinnu árini.

- Tað er gott, at fólk hava mót uppá at fara í gongd, tí tað er ein sannroynd, at føroyska fiskavirkisvinnan hevur ongantíð givið tað stóra, sum hann tók til.

Bjarni sipaði í hesum sambandi til, at P/F Kósin í Klaksvík nú er undir endurreisn og væntandi letur uppaftur í nærmastu framtíð.

Ein av teimum, sum var við á framløgufundinum hósdagin, var Hanus Hansen, ið er høvuðsmaðurin aftanfyri keypið og endurreisnina av Kósavirkinum í Klaksvík.

### Dýrur ráfiskur

Á framløgufundinum varð eisini víst til ársfrágreiðing hjá Føroya Ráfiskakeyparafelag, sum kemur til ta





*Bjarni Arnason og Jacobina í Lambanum, sum stóðu fyri framløguni hjá NOTA*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*